**tíðindablaðið sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Stór og spennandi avbjóðing

*Oddagrein*

MiKUDAGURIN 17. mai fer helst í søguna sum ein týðandi dagur fyri føroyska vinnu og samfelagið alt. Henda dag gekk freistin út at bjóða uppá oljuleiting á føroyska landgrunninum. Fyribils úrslitið má sigast at vera áhugavert og helst eisini nøktandi. So er spurningurin, hvat stendur í teimum mongu umsóknunum. Tað fáa vit helst ikki at vita fyrr enn Oljumálastýrið hevur tikið avgerð um, hvussu teigarnir verða býttir út um einar tríggjar mánaðir.

SAMTÍÐIS sum henda fyrsta útbjóðing er farin av bakkastokki, flutti Oljufyrisitingin í nýggj høli. Hetta er eisini kærkomið, tí nettupp komandi tíðin fer at seta sera stór krøv til fólkini í Oljumálastýrinum og ráðgevar tess. Útgangsstøðið hevur alla tíðina verið at viðgera umsøkjararnar eins, uttan mun til um teir eru føroyingar ella útlendingar. Vit hava onga orsøk til at halda, at leiðslan í Oljumálastýrinum fer at broyta „politikk" sín á hesum øki, tó at tvey føroysk oljufeløg eru við.

FYRI Føroyar ræður um at fáa tey feløgini, sum bjóða fram bestu arbeiðsskráirnar og annars hava skilabesta atlitið til føroyska samfelagið og umhvørvið, til at seta spónin í undirgrundina, soleiðis at tað, sum kemur burtur úr kann ganga Føroyum og føroyingum sum frægast. Tað hevur verið politikkurin hjá okkara myndugleikum, at føroysk virki og vinnulív eiga at verða tikin við í komandi oljuvirksemi, og hetta tykist eftir øllum at døma at verða ein boðskapur, sum er komin fram á rætta stað. So er spurningurin, hvat er mest realistiskt at kunna rokna við av føroyskari luttøku? Er tað t.d. rætt fyri einhvønn prís at draga føroyskt vinnulív uppí eitt og alt? Umframt at taka vinnulívið við, í hvussu stóran mun eiga vit eisini at fokusera uppá útbúgvingarverkið? Tað verður helst ein sera torfør uppgáva hjá Oljumálastýrinum at velja og vraka millum tær ymsu umsóknirnar, tá tær helst allar vilja ganga langt fyri at ganga ynskjunum um føroyska luttøku á møti. Síðani er tað spurningurin um at vera við til at kanna aðrar partar av landgrunninum enn bert sokallaðu „gullteigarnar", sum flestu av feløgunum helst hava biðið um. Hvat vilja feløgini vága í teimum „minni áhugaverdu økjunum" fyri at fáa part av teimum meira lovandi økjunum? Tað hvílir ein stóra ábyrgd á Oljumálastýrinum í hesi tíðini, sum kemur. Við teimum góðu kreftum har eru og við teimum røttu ráðgevunum, eiga vit hava álit á,at fólkini í Oljumálastýrinum fara at megna uppgávu sína. Tað slóðbrótandi arbeiði tey longu hava gjørt, boðar frá góðum.

***Sosialurin***

# Tað eru pengar í russunum

*Russisku skipini, sum umskipa í Føroyum, keypa eisini proviant og aðra útgerð hiðani, umframt at teir gjalda havnargjøld og annað. Teir leggja pengar eftir seg í Føroyum*

EDVARD JOENSEN



*Mr. Russia himself, Árni Dam, hevur úr at gera. Hann tosar føroyskt í aðra telefonina og enskt í hina. Ofta eisini russiskt við einhvønn russa, sum stendur á skrivstovugólvinum*
**Mynd: Álvur Haraldsen**

Skipafelagið Føroyar hevur longu avgreitt umleið 200 fremmand skip í ár. Av hesum er góð helvtin russar, sum koma hendan vegin at umskipa og leggja upp frystan fisk.

Mangan verður hildið, at russararnir einki leggja eftir seg, men so er als ikki. Árni Dam á Skipafelagnum Føroyar sigur, at teir proviantera fyri einar 50.000 krónur hvør. Umframt kemur bunkring, onkur umvælir reiðskap, og sjálvandi gjalda teir eisini havnargjald sum øll onnur skip. Og tað hevur gingið sum hjá øðrum at fáa pengarnar inn.

Nógvu russisku skipini, sum seinnu tíðina hava ligið í Nólsoyarfirði, eru slík, sum koma hendanvegin at umskipa svartkjaft, sum teir fiska undir Føroyum, sigur Johnny Thomsen á Skipafelagnum Føroyar. Skipafelagið umboðar hesi skipini, tá tey eru her. Ímyndin av hesi umboðan er uttan samanbering Árni Dam, sum man vera kendur av mongum sum hann, sum hevur við russararnar at gera. Umframt teir báða Árna og Johnny, arbeiðir Maria á Lava eisini hálvan dag á deildini.

200 skip higartil í ár er rættiliga nógv. Um somu tíð í fjør høvdu gott stórthundrað verið her. Men talið er eisini vaksið munandi seinnu árini. Í 1995 umboðaði Skipafelagið Føroyar 121 fremmand skip í Føroyum. í 1999 var talið komið upp á 366. Og higartil í ár liggur tað so longu um tey 200. Men sjálvandi er ikki sagt, at streymurin heldur fram. Tað velst um, hvussu fer at gangast við fiskiskapinum hjá russunum, sigur Johnny Thomsen. So talan er heilt greitt um eina vaksandi forrætning, sigur hann. Nógv tann størsti parturin av teimum fremmandu skipunum, Skipafelagið árliga fær, eru russisk. Næstir eru norðmenn.

Tað er tó ikki bara í Nólsoyarfirði, fremmandu skipini liggja. Tey eru um alt landið. Úr Vági til Klaksvíkar, og mangan fleiri í senn. Ein dagin í vikuni vóru tríggir russar samstundis og løgdu frystan fisk upp til ymisk flakavirki, sigur Johnny Thomsen. Tann dagin, flest skip vóru í vár, vóru heili 14 fremmand skip hjá Skipafelagnum samstundis. Tvey á Sundi og 12 í Nólsoyarfirði, greiðir Johnny Thomsen frá. Tað hevur eingin dagur verið í ár, uttan okkurt fremmant skip hevur verið hjá Skipafelagnum.

Nógv tað mesta av svartkjaftinum fer til Russlands, har hann verður brúktur til mannaføði. Tvey skip vóru tó herfyri í Vági eftir svartkjafti, sum eitt enskt felag hevði keypt og sum skuldi til Afrika.

Teir nógvu russarnir, sum fiska undir Føroyum koma mestsum allir til Føroya at umskipa. Onkur hendingur fer til Hetlands, sigur Johnny Thomsen. Tað er ikki vanligt, at skipini skifta manning her kortini. Og teir eru leingi umborð í senn. Hálvt ár er heilt vanligt.

Eisini koma onnur russisk skip við fiski, sum verður lagdur upp her í transit. Til dømis var Amerloq, sum er gamli rækjutrolarin Sólborg, mánadagin og legði 327 tons av frystum fiski inn á goymsluna hjá Skipafelagnum, sum so skal flyta hann víðari. Helst til Kanada.

## Tøkk

Ein hjartans tøkk veitist øllum tykkum mongu, sum sýndu samkenslu og hjálptu til, tá ið okkara góði maður, pápi, abbi og langabbi

**LEIVUR EJDESGAARD**
**úr Oyndarfirði**

doyði og varð jarðaður.

Somuleiðis ein hjartans tøkk til Jógvan prestin, John Júst og Bjarna Berg fyri fløvandi orð, sang og tónleik.

Ein serlig tøkk til sangarar, kirkjutænarar og tykkum, sum vóru í kapellinum og til jarðarferðina.

**Bodil,**
**Sólgerð, Jústinus, Jón Ingi,**
**Lív, Fróði og Sjúrður**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá ið kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**THEODOR EGHOLM**
**Streymnes**

doyði og varð jarðaður. Takk til tykkum á Sambýlinum í Vestmanna, fyri ta tíðina hann var har. Takk til kirkjutænarar, sangarar, gravarar og tykkum, ið hjáptu til við jarðarferðini. Somuleiðis takk til tykkum, ið sendu blómur, kransar og lótu gávur til sambýlið, og øllum tykkum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna,*
**børnini**



# Bispur kennir seg vrakaðan



*Karsten Nissen, bispur í Viborg*

*Karsten Nissen, bispur í Viborg, skilir ikki, at sóknarprestarnir í Klaksvík saman við kirkjuráðnum sýta fyri, at hann skal sleppa at prædika í Christianskirkjuni á hvítusunnu*

JOHN JOHANNESSEN

Fyrst varð Karsten Nissen, bispur í Viborg, av Føroya bispi boðin at prædika í Christianskirkjuni í Klaksvík á hvítusunnu. Men síðani varð hann vrakaður av báðum sóknarprestunum og kirkjuráðnum í Klaksvík.

Hetta skilir Karsten Nissen ikki. Hann hevði glett seg at koma til Føroya og at prædika í Klaksvík. Men nú hann er vrakaður har, ætlar hann sær heldur ikki at prædika nakra aðra staðni í Føroyum. Tað undrar hann almikið, at hann fyrst verður biðin um at prædika her, men síðani biðin um at lata vera.

Orsøkin til, at sóknarprestarnir, Niels Pauli Danielsen og Hans Eiler Hammer saman við kirkjuráðnum í Klaksvík hava vrakað danska bispin er, at hann saman við restini av donsku bispunum í 1997 hevur skrivað undir eitt skjal, ið staðfestir, at danskir prestar skulu hava loyvi at staðfesta skrásett paralag millum samkynt í fólkakirkjuni.

### Onga halgigerð fyri samkyntum

Bispurin í Viborg vísir á, at orsøkin til, at donsku bisparnir hava skrivað undir skrivið frá oktober 1997 er, at teir meta hetta forða fyri, at tað kemur so langt, at samkynt verða vígd í kirkjunum.

– Tað er í veruleikanum soleiðis, at samstundis sum skrivið staðfestir, at prestar kunnu halda eina guðstænastu, har samkynt paralag verður staðfest, vísir tað møguleikanum fyri at halda serliga halgigerð fyri samkyntum paralagi aftur, sigur Karsten Nissen.

Bispurin vísir á, at allir limir í fólkakirkjuni hava loyvi til at heita á prest sín um at halda eina serliga andakt í kirkjuni fyri sær. Skrivið, donsku bisparnir hava skrivað undir, staðfestir bert, at samkynt eisini hava hendan rætt, sigur hann.

Sjálvur mælir Karsten Nissen, bispur, ikki teimum 173 prestunum í stift síni til at staðfesta samkynt paralag við serligari guðstænastu. Men hann heldur tó, at hann gjørdi rætt, tá hann skrivaði undir skrivið frá 1997.

### Kirkjan er fyri øll

Karsten Nissen heldur tað vera óskynsamt av føroysku prestunum, ið eisini eru limir í donsku fólkakirkjuni, at sýta donskum bispum at prædika í føroysku kirkjunum.

Bispurin vísir í hesum sambandi á, at tað ikki ber til bert at hava kirkjuna til taks fyri teimum, tú ert samdur við. Kirkjan er fyri øll.

Tað undrar danska bispin, at føroyingar, ið eru limir í somu fólkakirkju sum danir, fara so harðliga fram móti starvsfeløgum sínum. Men Karsten Nissen tekur tað kortini ikki nær, at hann er vrakaður. Hann vísir á, at slíkt eigur hann ikki at taka at sær persónliga.

Kortini harmar tað Karsten Nissen, at hann ikki slapp at prædika í Christianskirkjuni, har altartalvan er ein heilur veggur úr dómkirkjuni í Viborg, har hann er bispur.

### Talan er ikki um provokatión

Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur í Klaksvík, sigur, at kirkjuráðið í Klaksvík og prestarnir hava gjørt av at boða bispi frá, at tey ikki ynskja, at Karsten Nissen skal prædika í Klaksvík, fyri at staðfesta, at tey ikki hava somu hugsan sum danski bispurin og hansara líkar.

– Karsten Nissen vil staðfesta nakað, meðan vit ynskja at staðfesta nakað annað. So greitt er málið, sigur Niels Pauli Danielsen.

Sóknarpresturin vísir á, at tá Karsten Nissen skrivaði undir skjalið frá oktober 1997, staðfesti hann sína hugsan. Tí heldur hann, at prestarnir í Klaksvík saman við kirjuráðnum nú kunnu staðfesta nakað annað afturímóti.

Niels Pauli Danielsen ger greitt, at tað vóru seks av átta valdum kirkjuráðslimum, ið heittu á hann og Hans Eiler Hammer um at sýta danska prestinum at prædika í Christianskirkjuni.

Sóknarpresturin vil ikki siga, um hann heldur, at prestarnir í Klaksvík fáa nakað burtur úr at sýta danska bispinum at prædika.



*Bispurin í Viborg hevði ynkst sær at sloppið at prædika í Christianskirkjuni, har altartalvan er ein heilur veggur úr dómkirkjuni í Viborg. Men sóknarprestarnir vrakaðu hann…*

# Leirvíksmálarar í Turkihusinum



Fríggjadagin 19. mai klokkan 15 letur upp ein »permanent« framsýning av málningum hjá Leirvíksmálarum í Turkihúsinum í Leirvík.

Í hesum sambandi fer Sámal Toftanes samstundis at sýna fram.

